Borgarstjórin í Leirvík, Sjúrður Eliasen:

# Tað stendur Leirvík á hekkuni…



*Tað var ógjørligt at avmynda nýggju skipini í myrkrinum og oysandi regninum, tá ið tey komu týskvøldið. Men mikumorgunin tóku vit hesa myndina*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Seinastu árini eru seks spildurnýggj skip komin til Leirvíkar, og tað kunnu vit sum bygd vera errin av, segði borgarstjórin**

NÝBYGNINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Leirvík, Sjúrður Eliasen, segði nøkur orð, tá ið nýggju skipini, Polarhav og Stjørnan, fyri fyrstu ferð løgdu til bryggju í Leirvík týskvøldið.

- Osmund og Tummas – og allir tit umborð á skipunum! Vælkomnir heim úr Íslandi við hesum nýggju, stóru og stásiligu skipum. Bygdarráðið, bygdarfólkið og onnur við eru komin saman her at fagna tykkum hesa hátíðarløtu. Og lat meg siga beinanvegin: Vit eru errin av, at tað stendur Leirvík á hekkuni á hesum skipum…

Borgarstjórin segði, at skipini eru eitt úrslit av áhaldandi og framhaldandi endurnýggjan og nýhugsan av okkara skipaflota, og Stjørnan og Polarhav eru væl kend nøvn.

- Síðan partroling byrjaði, er hetta triðja parið við hesum nøvnum.

Hann vísti á, at eitt, sum hevur sermerkt hesi skip, er, at manningarnar hava trivist ógvuliga væl umborð á teimum.

- So, samanhaldið millum manning og reiðarí má hava verið sera gott, legði hann aftrat.

### Ikki bara rúgvan

- Havið er tað sama nú sum fyrr. Har kanst tú uppliva alt veður. Tí er at frøast um, at so nógv verður hugsað um at gera alt betri og betri fyri manningarnar. Men eisini fyri at fáa fisk – og at fáa hann til lands so góðan og feskan sum gjørligt.

Sjúrður vísti á, at tað ræður um at fáa sum mest í peningi burtur úr tí, sum fiskað verður.

- Eingin livir longur bara av nøgd. Góðska skal eisini til, og hesi bæði til samans geva peningin at rinda skipini og hýrurnar fyri.

Og Sjúrður helt fram:



*Sjúrður Eliasen, borgarstjóri í Leirvík, avmyndaður í garðinum við kommunuskrivstovuna mikumorgunin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Her liggja so tey nýggju og stásiligu skipini, sum vit øll gleða okkum um at sleppa umborð á og síggja.

Borgarstjórin segði seg vóna, at hetta ódnartak verður til stóra signing fyri skip og manning – ja, til signing fyri okkum øll.

### Seks nýggj skip

Sjúrður segði, at seinastu árini eru seks spildurnýggj skip komin til Leirvíkar.

- Og tað kunnu vit sum bygd vera errin av.

At enda ynskti hann góða eydnu við skipunum báðum og segði seg vóna, at tey fara at føra mangan fyltan fongin til lands.

Lesið eisini greinina á blaðsíðu 30 í blaðnum í dag.

## Jólabygdin Æðuvík tendrar

HUGNI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur verið hugnaligt at rulla sær oman í bygdina í Æðuvík í jólamánaðinum. Húsini í vøkru bygdini er øll upplýst við jólaperum av alskyns slagi, heilt úr túninum upp í skjøldrarnar, og onkur flaggstong hevur eisini fingið síni ljós, heilt upp í sjálvan toppin.

Og æðuvíkingar vilja varðveita hesa "traditiónina" til gleði fyri bygdarfólkið og tey, sum vitja bygdina.

Aftur í ár fara æðuvíkingar at pynta.

### Ljósini tendra

Komandi sunnudag, sum er fyrsti sunnudagur í advent, verður tendrað - og hetta verður júst klokkan 19.

Hornorkestrið fer at spæla og Árni Joensen, sum er borgarstjóri í Oyndarfirði, fer at halda røðu.

Í Æðuvík siga tey, at eplaskivur og gløggur verða at fáa undir tiltakinum.

- Vit ynskja øllum at vera hjartaliga vælkomin til Æðuvíkar, siga tey í syðstu bygdini í Runavíkar kommunu, sum nú fer at líkjast sær sjálvari í jólamánaðinum.

# Ókeypis hugnaløta í Vestmanna

**- Tiltakið er alment, og øll eru hjartaliga vælkomin, siga tey, sum varða av Vestmanna Kirkjukóri**

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi sunnudag, 28. november klokkan 18, sum eisini er fyrsti sunnudagur í advent, skipar Vestmanna Kirkjukór saman við Vestmanna kirkju, fyri hugnaløtu við ókeypis ábiti í auluni í Vestmanna skúla.

Í fleiri ár hevur Kirkjukórið skipað fyri hesi hugnaløtu – og nú sunnudagin endurtaka tey í Vestmanna so hetta tiltak.

Á skránni verður røða, tónleikur, kórsangur, felagssangur og annað.

Tað verður Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sum fer at siga nøkur orð.

Teir báðir, Pauli Magnussen og Jógvan Toftum fara at spæla undir til kórsangin og felagssangin sum verður.

Umframt Paula og Jógvan, fer tann landskendi, Magni Christiansen, at syngja nøkur løg av nýggju fløguni, sum kemur út til jóla.



*Vestmanna Kirkjukór avmyndað í Roskilde kirkju*

Vestmanna Kirkjukór, sum telir eini 40 fólk undir leiðslu av Erlu Olsen, kemur eisini at framføra nakrar sangir.

Hini árini, tiltakið hevur verið, hevur aulan í Vestmanna skúla verið meir enn full, og tí heita stigtakararnir á fólk um at møta stundisliga til hugnaløtuna.

Tiltakið í Vestmanna skúla er ókeypis, men fólk kunnu eins og seinast lata eitt oyra til Vestmanna kirkju.

- Tiltakið er alment, og øll eru hjartaliga vælkomin, siga tey, sum varða av Vestmanna Kirkjukóri.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## John Høj 75



Í dag, 25. november, fyllir John Høj í Klaksvík 75 ár. Mamma hansara, Ebba, var ættað úr Innistovu í Vági (Klaksvík), og pápin, Jákup Adrian Høj, var ættaður av Strondum. John vaks upp á Vágsheygnum, og har hevur hann búð mestsum alt sítt lív. Tó búði hann úti í Grótinum í nøkur ár eftir, at hann giftist við Fíu, dóttir Annu og Jógvan Isaksen.

John tók millumskúlaprógv í Klaksvík. Hann arbeiddi so í krambúðini á Stongunum og á skrivstovuni hjá Kjølbro í nøkur ár. Fyrst í fimmtiárunum fór hann at arbeiða á Klaksvíkar Hermetikk, vanliga nevnd Bollafabrikkin. Virkisleiðari har var týskarin Paul Lammers, og John fór við honum til Týsklands at læra hermetikk og haðani til Svøríkis at nema sær meira kunnleika. Heimafturkomin varð hann virkisleiðari á Bollafabrikkini. Umframt at hava útbúgving í hermetikkframleiðslu, hevði hann eisini keypt allar uppskriftirnar hjá Lammers. Í 1964-65 endaði hann sína útbúgving á Norges Hermetikfagskole í Stavanger.

Á Bollafabrikkini framleiddu tey ymiskar vørur: bollar og fiskakøku í blikkum, gaffilbitar, sild í tomat, fugl í soði, og tey arbeiddu eisini hummara. Hermetikkvirkið var eitt av teimum góðu arbeiðsplássunum í Klaksvík, millum annað tí at arbeiðið var so fjølbroytt frá einari árstíð til aðra.

Fyrst í 60-unum fór Kjølbro eins og aðrir í landinum at royna flakavinnu umframt framvegis at arbeiða saltfisk og klippfisk. Ein part av árinum varð flak skorið á Bollafabrikkini, til tað stóra flakavirkið á Kósini læt upp í 1966.

John varð settur sum virkisleiðari á flakavirkinum og var har til 1991, ta seinastu tíðina sum stjóri. Bollafabrikkin virkaði undir aðrari leiðslu í nøkur ár, men varð so latin aftur við alla.

Frá 1980 og nøkur ár fram var John eisini nevndarlimur í Pf. J.F. Kjølbro.

Kósavirkið var tað størsta í landinum, men John hevði eisini áhuga fyri landsins minsta flakavirki. Um ársskiftið 1973-74 keypti hann virkið í Árnafirði, og tað fór aftur undir flakaframleiðslu í august 1974. Virkið keypti í fyrstani mest smáa hýsu frá Kósavirkinum og spesialiseraði seg í at gera raspað hýsuflak, sum hevur roynst óføra væl og hevur fingist til keyps í handlinum fyri sera rímiligan prís. Tey seinnu árini hevur virkið keypt fisk á uppboðssølu.

Virkið í Árnafirði er bygt út fleiri ferðir, seinast í fjør. Tá varð frystiorkan munandi økt og nýggj skrivstova bygd. Arbeiðið á virkinum hevur verið rættiliga støðugt.

John og Fía eiga børnini Ebbu, Jógvan og Joan. Ommu- og abbabørnini eru 11 í tali og langommu- og langabbabørnini 2.

John og Fía hava havt sína trúligu gongd í Betesda. Tey sungu í kórinum, og John var eisini sunnudagsskúlalærari í mong ár.

## Jákup Kass 80 ár



Hósdagin í síðstu viku, 18. november, varð Jákup Kass á Strondum 80 ár. Hann fór stillisliga avstað, og rundi dagurin varð hildin saman við familjuni. Jákup Kass var í mong ár frammarlaga í samfelagnum, men nú eru nøkur ár síðani, at hann og konan, Anna, fluttu aftur til Strendur, har tey búgva í barndómsheiminum hjá henni.

Foreldrini hjá Jákupi Kass vóru Sanna og Bartal Johasen í Kass á Strondum. Tey fingu tíggju børn. Jákup er elstur, Hilmar býr í Havnini, Nicolina býr í Havnini, so eru tað tvíburðarnir Hanni, sum býr á Strondum, og Hanna, sum býr í Vejle, Anne Bertha býr í Havnini, Sólborg býr á Argjum, Judith býr í Vejle, Hans Jákup býr í Keypmannahavn, og Ernst býr í Havnini.

Jákup tók málsligt studentsprógv í 1944. Eftir kríggið fór hann til Keypmannahavnar, har hann gekk á Niels Brock, og síðani var hann í mong ár saman við pápanum og brøðrunum við í handilsvirksemi og útgerðarfelag á Strondum. Teir í Kass høvdu handil og fleiri skip og bátar, eitt nú Austerlitz, Lambanes, Sjófarið og Polarfarið.

Í seksti árunum fór Jákup Kass í starv hjá Esso. Eitt ár var hann í Danmark og setti set inn í tingini. Í 1966 flutti familjan til Havnar, og í 1971 tók Jákup Kass stjórastarvið eftir Esmar Fuglø í Esso. Har var hann inntil í 1980. Prestatrotið í Danmark bar við sær, at tað í sjeyti árunum bar til hjá teimum, sum høvdu lívsroyndir og útbúgvingar at lesa gudfrøði eftir serligum treytum. Onkrir føroyingar tóku av hesum tilboðnum. Millum teirra var Jákup Kass, sum studeraði, meðan hann var stjóri í Esso og seinni Statoil, og meðan hann røkti fleiri onnur álitisstørv, eitt nú í Sjóvinnubankanum, har hann var næstformaður í nevndini.

Í 1980 fór Jákup úr stjórastarvinum í Statoil. Tá flutti hann inn á Nes, har hann var nógv avhildin sóknarprestur fram til 1994. Tað var í hansara tíð í Nes prestagjaldi, at nýggja Fríðrikskirkjan varð bygd. Hon varð vígd fyrsta sunnudag í advent í 1994 ella stutt eftir, at Jákup var farin úr starvinum.

Jákup var frá ungum av virkin í heimamissiónini, og í prestatíðini var hann eitt skifti formaður fyri føroysku heimamissiónini. Tá ið Vesturkirkjan varð vígd í 1975, varð Jákup Kass annar av deknunum, og tað tænastuna røkti hann saman við Steingrími Niclassen, inntil hann flutti inn á Nes.

Jákup Kass giftist í 1949 Við Onnu Johansen, sum eisini er ættað av Strondum. Tey bæði eru systkinabørn og javngomul. Hon fylti 80 27. juli í ár. Anna og Jákup Kass eiga trý børn: Marjan býr á Nesi, Bartal býr á Argjum, og Karin býr í Havnini. Barnabørnini eru átta, og tað er so smátt afturat í triðja ættarliðnum.

## Sólrun Lómstein 65 ár



Í dag, hósdagin 25. november, verður Sólrun Lómstein á Toftum 65 ár. Sólrun er væl kend á Toftum, har hon saman við manninum rekur einasta matvøruhandilin í bygdini.

Foreldrini hjá Sólrun vóru Betty og Petur Skaale á Toftum. Tey fingu tvær døtrar. Sólrun var tann eldra, og Betty, sum er gift Jógvani við Keldu í Klaksvík, var tann yngra. Mamman doyði, tá ið hon hevði átt hana, og hon er uppkallað eftir mammuni. Piddi var 93 ára gamalur, tá ið hann doyði í 1999. Hann búði fyri seg sjálvan, men Sólrun og hennara vóru serliga nógv um hann.

Sólrun vaks upp mitt í meldrinum á Toftum. Pápin hevði handil og postin, og harvið kendi hann eisini ábyrgd fyri mjólkabátunum, sum við farmi og fólki sigldu millum Havnina og Skálafjørðin. Mest sum alla sína tíð hevur Sólrun verið við í virkseminum hjá pápanum, og nú eru tað næstan 34 ár síðani, at hon og maðurin yvirtóku handilin, sum tey framvegis eiga og reka.

Sólrun var ikki meiri enn stór smágenta, tá ið hon fór at spæla í sunnudagsskúlanum í salinum á Toftum, og fram ímóti einari hálvari øld hevur hon spælt til møtini í salinum. Ivaleyst eru tey fleiri, sum komast við plátuna, sum Sólrun Skaale og Oddmar Færø sungu fyri meiri enn fjøruti árum síðani. Eitt nú sungu tey Lítið barn sum meg.

Sólrun fylgir væl við í samfelagnum, hon er familjukær, hevur serligt hegni at taka sær av fólki, og hon er sera góð við heimstaðin. Eitt nú hevur hon verið virkin í fornminnisfelagnum og bygdasavninum á Toftum, síðani tey vórðu sett á stovn.

Í 1967 giftist Sólrun við Hanusi Lómstein, sum er ættaður úr Syðrugøtu. Tey bygdu uppi á Hamri, og tey eru mong, sum hava sitið væl inni hjá teimum. Sólrun og Hanus eiga fýra børn, sum øll eru gift og eiga børn: Betty býr í Keypmannahavn, har hon er farmaseutur, Erla er trúboðari í Venezuela, Gurðun er trúboðari í Russlandi, og Andrass flutti í summar úr Keypmannahavn og aftur til Toftir, har hann er lærari. Sólrun eigur ellivu ommubørn - tríggjar gentur og átta dreingir.

## Tøkk



Øllum tykkum, sum stukku inn á gólvið og mintust meg á 70 ára føðingardegnum, og við gávum, blómum, fjarritum og telefonsamrøðum gjørdi okkum dagin hugnaligan, takki eg hjartaliga.
Somuleiðis vilja vit ynskja vinum og kenningum gleðilig jól og eydnuríkt nýggjár.

*Vinarliga heilsan*
**Hady**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu okkum og sýndu okkum samkenslu, tá elskaði maður og pápi okkara

**Niels Petersen**
**Nuuk, búsitandi í Kaldbak**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og heilsanir.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og øll tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað, og tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á G4 fyri dyggan stuðul og umsorgan hansara seinastu tíð.

**Sólja, Ivalu og Janus**

## 85 ára føðingardagur

Í dag, 25 november fyllir Frederik Jacobsen, Klaksvík 85 ár.

Dagurin verður hildin hjá soninum Maller, undir Klakki 26 frá kl. 16.00.

## Dagurin

**25. november. Katrin**, deyð umleið ár 300. Halgisøgurnar greiða frá eini vakrari og klókari prinsessu í Aleksandriu, sum mangir hábornir menn bóðu um, líka keisarin. Men hon vildi ongum játtast, tí at Kristus var hennara sanni brúðgómur. Hon viðgekk alment kristnu trúgv sína og varð tikin av døgum. Hon varð jarðað á Sinaifjalli, har eitt katrinarkleystur er bygt yvir grøv hennara.

Navnið er grikst og merkir *hin reina, hin óspilta.*